Valhalla

# Rakstrarleiðari
## til fyritøku á Toftum

Søkt verður eftir rakstrarleiðara til fiskavirkið Valhalla P/F á Toftum.

Valhalla P/F er ein fyritøka, har høvuðsvirksemið er framleiðsla og søla av feskari fiskavøru av bestu góðsku. Vøran verður seld í Europa og Stóra Bretlandi.

Valhalla P/F hevur síðani byrjan havt stóran vøkstur og inntøku. Framleiðslan á Toftum liggur um 5.000–6.000 tons um árið. Stórir møguleikar liggja fyri framman; at royna hesir er treytað av, at finna rætta rakstrarleiðaran, sum megnar at ímøtikoma teimum.

Høvuðsuppgávan verður at optimera núverandi framleiðslu. Eftirhondini vil eisini ein stórur partur av arbeiðnum verða samferðsla við fiskibátar, innkeyp á fiskamarknaði og framleiðsla av nýggjum vørum.

Vit vænta av tær, at tú á ein leiðandi hátt í tøttum samstarvi við stjóra og onnur starvsfólk í fyritøkuni kanst tryggja virkinum eina positiva menning. Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, ert álítandi og megnar at taka ábyrgd.

Vit bjóða eitt starv, sum er áhugavert við atliti til ávirkan, sjálvstøðuga tilrættisleggjan og møguleikar til menning.

Løn eftir førleika. Við tíðini, møguleika fyri at starvast eftir eini bónusskipan

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við møguligum prógvum, royndum og viðmælum skulu vera okkum í hendi innan
28. januar 2005 og sendast til:

**Valhalla P/F**
**FO-650 Toftir**

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til stjóran Peter Vognsen Nørgaard á tlf. 449780.

# Arsaðalfundurin 2005

Fráboðaði aðalfundurin er fluttur til leygardagin hin 19. februar kl. 14.00 á Hotel Føroyum.

Skráin fyri fundin verður lýst seinni.

Møtið fjølment.

**Nevndin**

# Pedagogur til
## Sambýli á Bóndaheygi 14

Innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribils tænastu á Sambýlinum á Bóndaheygi 14 er eitt tænastumannastarv sum pedagogur leyst at søkja til setan 01.02.2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt eftir tænastumannatalvuni fyri pedagogar lønarstig 24-33.

Talan er um vaktararbeiði bæði dag, kvøld og nátt.

Á Sambýlinum á Bóndaheygi 14 búgva fimm menningartarnað fólk við serligum tørvi.

Viðkomandi, sum settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í sínum arbeiði, skal vera opin fyri nýhugsan og hava vilja til at samstarva við onnur. Umsøkjarin skal eisini vera væl fyri likamliga, og vera førur fyri at taka lut í frítíðartiltøkum og arbeiðstilboðum saman við húsfólkunum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólki á tlf. 315917.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmælum v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 31. januar og sendast til:

**Sambýlið Bóndaheygur 14**
att: Fyristøðufólki
Bóndaheygur 14
100 tórshavn

# Varaleiðari
## til Sambýlini á Bóndaheygi 14

Innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribild tænastu í Sambýlinum á Bóndaheygi er eitt starv sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu. Starvið er tænastumannastarv, sett eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt lønarstigini 32, 34, 36 og 38.

Á Sambýlinum á Bóndaheygi 14 búgva fimm menningartarnað fólk við serligum tørvi.

Arbeiðsuppgávurnar hjá varaleiðaranum eru fyriuttan at luttaka í vanliga arbeiðinum á sambýlinum eisini at luttaka í leiðsluarbeiði í sambýlinum, eins og hann má vera førur fyri at yvirtaka uppgávur leiðarans, tá hesin er burturstaddur.
Væntað verður av varaleiðaranum, at hann hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiði í gerandisdegnum at ganga, hevur hugflog og kann átaka sær nýggjar avbjóðingar.
Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hava fakliga vitan og er áhugaður í at menna seg í arbeiðinum.
Bert fólk, sum hevur lokið námsfrøðiligt prógv, kunnu søkja starvið.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 315917. Umsóknarfreistin er 7. februar 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Sambýlið á Bóndaheygi**
att. leiðarin
FO-100 Tórshavn

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Størv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2005

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi námsfrøðiligum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla skúlaárið 2005/06

Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.

Størvini eru tímalærarastørv. Tímarnir, sum leysir eru at søkja, eru í hesum lærugreinum:

**Støddfrøði:** grundlærugreinin í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 5 undirvísingartímar um vikuna.
**Drama:** á pedagogútbúgvingini, umleið 5 undirvísingartímar um vikuna, og á læraraútbúgvingini, 2 undirvísingartímar um vikuna. Herumframt 2 tímar um vikuna til alment drama.
**Danskt:** Grundlærugreinin danskt í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 4 undirvísingartímar um vikuna.
**Samtíðarkunning:** Í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 3 undirvísingartímar um vikuna.
**Samfelagsfrøði:** á pedagogútbúgvingini 2,75 undirvísingartímar um vikuna.
**Sangi:** Umleið 5 tímar um vikuna

Tey, ið sett verða í størvini, skulu hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ella á annan hátt prógva neyðugan førleika.
Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein/um við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini kunnu tey, ið sett verða, fáa møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Tímalærarastørvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya, annars sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu stílast til Føroya Læraraskúla og sendast til

**Føroya Læraraskúla,**
Postsmogu 348,
FO-110 Tórshavn
Áskrift: Umsókn

Umsóknirnar skulu vera skúlanum i hendi innan
15. februar 2005 á middegi.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við rektaran, ið er at hitta á tlf.313501 ella á tlf. 225328 ella á telduposti paulini@flsk.fo

**Føroya Læraraskúli**
**12. januar 2005**